ListaMeldur 2022

BUM! Avbjóðing!

# FLAGGKAPPING

Tit skulu finna eitt flagg sum skal umboða tykkara skúla!

**Kappingin gongur fyri seg á hendan hátt:**

1. Fyrst teknar hvør næmingur eitt flagg.
2. Skúlin skipar fyri einari flottari flaggframsýning á skúlanum, so øll hava møguleika at síggja vøkru listaverkini!
3. Næmingaráðið í tykkara skúla velur eitt flagg úr flottu framsýningini, sum skal umboða tykkara skúla
4. Flaggið verður sent inn til kappingina

**Hvussu skal flaggið síggja út?**

Øll fløggini skulu vera í A4-støddd, og øll skulu leggja pappírið vatnrætt, tá tit fara í gongd við at tekna.

Flaggið skal umboða tykkara skúla, og tí er kanska snilt at gera eitt hugarok. Hyggið eftir, hvat eyðkennir tykkara skúla: Er tað bygningurin? Næmingarnir, sum ganga har? Lærararnir? Listaverkini? Umhvørið? Huglagið? Skal tað vera ein boðskapur á flagginum?

Alt er loyvt - Tit sniðgeva sjálv flaggið 😊



**Hvar skal flaggið sendast?**

Lærarin tekur eina mynd av vakra vinnaraflagginum og sendir myndina til henny@nam.fo

Tað kann vera ómetaliga torført at velja millum so nógv flott fløgg, so lærarin er hjartaliga vælkomin at senda vinnaraflaggið + onnur vøkur fløgg, sum vit kunna vísa fram á síðuni hjá **ListaMelduri**